# Snøggar teldur



Fujitsu Siemens hevur tikið eitt stórt og djarvt stig, nú teir hava sent Esprimo Q5000 á marknaðin. Snøæggari teldu enn tað sama, skal í øllum førum leitast leingi eftir. Heldur enn stóra kassan, sum vanliga stendur á ella undir telduborðinum, er talan um ein sera snøggan og lítlan kassa, har pláss er at seta fløguna ella DVD'in í, umframt eina rúgvu av USB-stikkum.

Ein vakur flatskermur og eitt kompakt tastatur hoyra eisini til standard-útgerðina, sum í aðrar mátar eisini livir upp til tey krøv, sum nútímans brúkarin setir. Eitt nú Intel-tøkni í gerðilinum, effektiv ljóðdoyving, sum ger telduna at kalla ljóðleysa og ein streymnýtsla, sum er óvanliga lág. Talan er á fleiri økjum um ein veruligan trendsetara innan PC-marknaðin, sum týski teldurisin við hesum hevur sent á marknaðin, og so verður spennandi at síggja, hvussu brúkararnir taka ímóti nýggju vøruni. Í øllum førum er upplagt, at hetta verður ein av teimum heilt populeru, tá talan er jólagávur í hálvdýrara endanum.

Her í Føroyum er tað Formula.fo, sum í fleiri ár hevur umboðað Fujitsu Siemens, ið selur nýggju teldurnar.



















